## Drekin vann sannførandi á Teistanum

Seinnapart í gjár var umróður í FM-kappingini í barnaróðrinum hjá gentum millum Teistan og Drekan. Ikki sørt av spenningi var undan róðrinum, tí hesir báðir bátarnir hava verið rættiliga javnir alt kappingarárið, hóast Teistin flestu ferðirnar hevur drigið longra stráið. Í dag var tað so Drekin, ið lá omaná, tá ið komið var um málstrikuna. Drekin vann við í minsta lagi einari bátslongd. Orsøkin til umróðurin í dag er, at á fyrsta FM-róðrinum á Norðoyastevnu varð Drekin diskvalifiseraður, eftir at verða komin á mál við júst somu tíð sum Teistin. Argja Róðrarfelag kærdi Drekan fyri viðurskifti, tey ikki mettu vera í lagi. Dómsnevndin í Róðrarsambandinum hevur síðan víst kæruni aftur. Teistin og Drekin liggja framvegis ávikavist sum nummar 1 og 2 í kappingini.



Mynd: www.hb.fo

## HB tekur ímóti Salzburg

HB fekk ein ordans vals, tá ið liðið spældi ímóti eysturríkska liðnum Red Bull Salzburg í farnu viku. Hetta var dysturin í 2. Undanumfari til Champions League kappingina. HB tapti 5-0, og tí er eingin spenningur um, hvat av liðunum skal víðari í kappingini. Men HB skal royna at koma fyri seg aftur í seinna dystinum, sum verður spældur í Gundadali týsdagin kl. 17.00.

# Fekk sjokk tá eg sá vøllirnar í Føroyum

**GRASLÍKI** Framleiðari av graslíkisvøllum heldur, at vøllirnir í Føroyum verða alt ov illa viðlíkahildnir, og tí eru í ringum standi



Tilvildarlig mynd

Tróndur Arge

– Eg fekk sjokk tá eg vøllirnar í Føroyum.

Soleiðis sigur Ben aan de Stegge, sum starvast hjá Greenfields, ið framleiðir graslíkisvøllir.

– Eg havi sæð einar átta ella níggju vøllir á ferðini í Føroyum, og eg eri sjokeraður av vánaliga viðlíkahaldinum, sigur hann víðari. Greenfields arbeiðir við at útvikla nýtt grasliki, sum minnir sum mest um vanligt gras.

– Tað tykist, sum fólk hava gloymt, at ein graslíkisvøllur eisini skal viðlíkahaldast. Eg havi sæð allan møguligan lort á vøllunum kring landið. Alt frá vanligum grasvøkstri til kipspakkar og annað órudd, sigur Ben aan de Stegge.

### V-gras

Greenfields, sum er ein hollendsk fyritøka, hevði í farnu viku ein kunnandi fund um sítt virksemi í Føroyum. Greenfields byrjaði sítt virksemi í 2003, og longu eitt ár seinni høvdu teir framleitt til yvir 100 vøllir kring heimin. Í dag hevur Greenfields lagt graslíki til yvir 1000 FIFA góðkendar graslíkisvøllir kring allan heimin.

– Tað nýggjasta innafyri graslíki eru V-formaði strá, ið ikki leggja seg niður uppá sama máta, sum tit kenna frá einum vøllinum í Gundadali. Um tú tekur eitt vanligt A-4 papír og stillar tað upp eftir enda, so dettur tað bara niður. Men forma tað sum eitt V, so ber væl til at fáa papíri at standa lodrætt, sigur Ben ann de Stegge, meðan hann demonstrerar sína teori á borðinum.

### Blanda gras og graslíki

Greenfields bjóðar fleiri sløg av graslíkisvøllinum. Millum annað eitt slag av graslíki, sum er partvís gras og graslíki. Fyrimunurin við hesum er, at tað kennist framvegis sum at spæla á vanligum grasi og vøllurin sær altíð grønur út. Eisini fyribyrgir graslíki, at vøllurin fer púra upp í mold, sum eitt nú er væl kent frá Skotlandi og lægri deildinum í Onglandi, serliga um veturin. Millum annað Coventry City í Onglandi hevur valt at gera nýtslu av hesum slagi av vølli.

Umboð fyri Greenfields í Norðurlondum eru danska fyritøkan Sportconnect, sum umframt Flemming Lauenborg, telur navnframa danska fótbóltsspælaran, Allan Ravn.

– Tað hevur stóran týdning, at ein graslíkisvøllur verður lagdur á orduligt. Vit leggja nógv fyri, tá vit leggja graslíkisvøllir á, sigur Flemming Lauenborg. Ein nýggjur graslíkisvøllur kostar millum tvær og tríggjar milliónir krónur. Alt eftir hvat fyri undirlag, og hvussu tjúkt tað skal verða og støddina á vøllinum. Tá er tikið hædd fyri, at bara graslíki skal legggjast á. Verður byrjað heilt frá grundini, so metir Flemming Lauenborg, at ein nýggjur leikvøllur kostar áleið fimm og eina hálva millión.

trondur@sosialurin.fo